


SALTSØLA

*Tað er her – beint vestanfyri bygningin, sum Sea Star hevur bygt á ídnaðarøkinum Inni á Rætt – at M.J. Saltsøla fær sína goymslu, sum soleiðis flytir úr Havn og heim á Toftir um stívliga eitt ár*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



MARK

*Nýggja saltsølan, sum J & K Petersen nú fara í holt við at byggja á Toftum, verður 70 metrar lang og 20 metrar breið. Goymslan fer at rúma umleið 5.500 tonsum av salti*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## » vit eru sera væl nøgdir við vælvildina hjá kommununi, nú vit hava arbeitt við hesi verkætlan

MAGNI JOHANNESEN

plássini, sum eru knýtt beinleiðis at eini slíkari saltgoymslu.

- Eg havi ein goymslumann, og síðan havi eg sjálvur tað bókhaldsliga um hendi, sigur stjórin.

Men tað eru ávísir ringvirkningar knýttir at eini goymslu, sum eitt miðal ár selir millum 14.000 og 16.000 tons av salti.

Í fyrsta lagi merkir hetta, at goymslan, sum er 5.500 tons, skal tømast og fyllast uppaftur tríggjar ferðir, og síðan er tað koyringin út til viðskiftafeløgini.

- Vit hava avtalu við OCD um koyring út til tey feløg, sum keypa tær stóru nøgdirnar av salti. Síðan hava vit avtalu við posta um tær smærru nøgdirnar, sum eitt nú fara í handlarnar.

Magni Johannesen sigur, at talan er bert um tvær støddir av sekkjum; tað eru 1000 kg. sekkir, sum virkini keypa – og síðan teir smáu, 25 kg. sekkirnir, sum fara í handlarnar.

Sosialurin kann leggja aftrat, at Nes kommuna eisini fer at fáa havna-og vørugjøld burtur úr at hava saltsøluna í kommununi.

### Sindur óheppið

Á ídnaðarøkinum Inni á Rætt, har M.J. Saltsøla nú fer at byggja, er eingin bryggjukantur. Tað merkir, at neyðugt verður at skipa saltið, sum kemur til goymsluna, upp longur úti á havnalagnum hjá Nes kommunu.

Í samrøðu við Sosialin hevur borgarstjórin í Nes kommunu, Símun Johannesen, áður sagt, at kommunan í løtuni ikki hevur ráð at gera bryggjukantin, sum ætlandi kemur Inni á Rætt.

Magni Johannesen sigur, at teir eru vitandi um hesa støðu, sum hann heldur vera eitt sindur keðiliga.

- Tá vit skipa salt upp á Vestaru Bryggju í Havn, fáa vit saltið beinleiðis inn á goymsluna, meðan neyðugt verður at koyra saltið av skipinum og inn á nýggju goymsluna á Toftum.

Hann heldur tó ikki, at hetta verður nakar stórvegis trupulleiki, og hann heldur heldur ikki, at hetta fer at gerast serliga kostnaðarmikið.

- Sjálvandi hevði tað verið lættari, um skip, sum koma við salti, kundu lagt at, har goymslan er, men soleiðis eru umstøðurnar nú einaferð – í hvussu er ta fyrstu tíðina, sigur hann.

### Gott samstarv

Stjórin í M.J. Saltsøluni letur annars væl at samstarvinum, sum hevur verið millum fyritøkuna og Nes kommunu.

- Jú, vit eru sera væl nøgdir við vælvildina hjá kommununi, nú vit hava arbeitt við hesi verkætlan, sigur hann.

Nes kommuna kemur framvegis at eiga og leiga út lendið undir nýggju saltsøluni, men tað verður M.J. Saltsøla sjálv, sum kemur at eiga og reka bygningin og virksemið.

Tað er Tórshavnar havn, sum eigur goymsluna á Vestaru Bryggju í Havn, har saltsølan leigar. Sjálv goymslan er ein stór silo, er bygd í 1998.

### Stór viðskiftafeløg

Millum stóru viðskiftafeløgini hjá M.J. Saltsøluni í Eysturoy eru eitt nú saltfiskavirkini Faroe Seafood á Toftum, Vaðhorn á Strondum og Fiskavirkið í Gøtu. Í Suðuroy er Delta Seafood eitt av teimum frægu viðskiftafeløgunum. Men tað eru eisini onnur feløg enn tey her nevndu, sum keypa salt frá P/F M.J. Saltsøluni, sum um ikki so dúgva tíð fer at flyta úr Havn og heim á Toftir.

Saltið, sum M.J. Saltsøla selir í Føroyum, kemur eins og áður av Miðjarðarhavsoynni, Ibiza, og hetta er umtókn salt millum viðskiftafeløg.

M.J. Saltsøla er størsti veitari av salti á føroyska marknaðinum.

vilmund@sosialurin.fo

fk Matseðil

Hósdagin 10. juni
**Karrygrýta / Nakkafillét**

Fríggjadagin 11. juni
**Chilli con Carne / Stoktur medistari / Rullusteik**

Leygardagin 12. juni
**Entrecôte**

Mánadagin 14. juni
**Fiskafrikadellur / Bollar í Karry**

Týsdagin 15. juni
**Rivjasteik / Kálvafrikassé**

Mikudagin 16. juni
**Stoktur fiskur / Kjøtfrikadellur**

*Til ber at keypa døgurða við heim*

**Matstovan í Hoyvík**